átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend *snorri@sosialurin.fo*



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## Vit mugu velja

**»Tann, ið ikki er við mær, er ímóti mær«**

**Lukas 11, 23**

Tað var vist Napoleon, ið var so bjartskygdur, at hann vágaði at halda, at tann, ið ikki var ímóti honum, var fyri honum. Tað torir Jesus nokk ikki at siga.

Hann vil tryggja seg móti at gerast vónsvikin. Hann roknar ikki við nøkrum menniskja, fyrr enn hann veruliga hevur tað. Tað er góðtrúni at telja øll tey líkasælu, tey sveiggjandi, tey ið ongantíð kunnu taka eina støðu. Tað kann eins væl henda, at tey enda millum fíggindarnar, tá ið tey umsíðir hava hugsað seg um og hava avgjørt, hvønn tey vilja hoyra til.

Tey líkasælu eru sum ein teigur á almenninginum, eitt onganmannaland, ið eingin enn hevur ognað sær. Tey lata seg taka av tí, sum kemur fyrst. Jesus hevur ikki altíð áhuga í at vera fyrstur. Ikki á tann hátt. Hann vil heldur hava menniskju til seinast og so varðveita tey, enn at fáa tey fyrst, fyri seinni at missa tey aftur.

Hann kennir bara tvey sløg av menniskjum: tey, ið eru við honum, og tey, ið eru ímóti honum. Øll tey líkasælu roknar hann millum tey seinast nevndu, inntil tey sjálvi hava valt at verða millum tey fyrru.

Hetta orðið er so greitt og einfalt. Tað sker beint tvørturav og tvingar okkum at velja, hvørjumegin strikuna vit vilja standa. Ikki at velja, er eisini eitt val. Tá ið vit ikki siga »Ja« til tað góða, hava vit harvið sagt »Ja« til tað illa. Kjakið má einaferð enda. Tað kann ikki halda fram. Vit kunnu ikki í ævir allar halta til báðar liðir.

Guð hevur einaferð sagt »Ja« við okkum. Nú eru tað vit, ið skulu siga nakað við hann.

# Hent bók til allar samkomur

**- Henda bókin »Samkoman« er ikki bert ein bók fyri ella um samkomuna í Lívdini. Hon er fyri allar samkomur, sigur trúboðarin Poul Færø í Klaksvík**



*- Jógvan hevur fingið fatur í tí sentrala boðskapinum um ta kristnu samkomuna, sigur trúboðarin Poul Færø (høgrumegin), sum her er avmyndaður saman við høvundanum*

*Mynd: Snorri Brend*

**Útgáva:** Fríggjadagin í farnu viku gav samkomuleiðarin í Lívdini, Jógvan Zachariassen út bókina »Samkoman«.

Hetta er ein bók ið viðger tað sum Bíblian lærir um samkomuna, og hvønn týdning tann kristna samkoman hevur havt upp til dagin í dag – og kemur at hava í framtíðini.

Millum tey fyrstu, ið ognaðu sær hesa 400 síðu stóru bókina, var Poul Færø. Og hann fegnast um bókina:

- Henda bókin fer uttan iva at lata eyguni á fólki upp fyri, at Guds samkoma er bara ein. So er líkamikið um ein býr í Føroyum ella í Afrika, sigur hann.

Í bókini er lætt at fáa eyga á, at tað er ein ungur maður sum hevur skrivað, tí eyguni eru opin fyri avbjóðingunum í framtíðini. Dentur verður lagdur á at vísa, hvussu tann einstaka samkoman kann gerast meiri viðkomandi í okkara tíð.

Poul Færø vónar, at Jógvan við bókini fær fólk at skilja, hvussu neyðugt tað er at tey kristnu sameinast og taka ímóti hvørjum øðrum.

Ella sum Poul Færø sigur tað: - Tað ber illa til at elska Gud, um ein ikki samstundis elskar sín bróður!

### Nógv uppá hjarta

Á samkomuni fríggjadagin, sum var sama dag sum høvundin fylti 40, varð víst á, at bókin ikki snýr seg um nakra ávísa samkomu.

Hon men umtalar heldur, í rættiliga víðum sjónarringi øll endurfødd menniskju sum Guds samkomu.

Jógvan Zachariassen heitti í januar mánaði í ár á forlagið Leirkerið um at geva bókina út. Hetta varð játtað honum.

Upprunaliga var ætlanin, at hon bert skuldi verða 150 síður. Men so líðandi vaks síðutalið, soleiðis at tað at enda kom heilt upp á 400 síður.

Hóast stóra síðutalið er hetta bert ein partur av tí, sum Jógvan Zachariassen hevur uppá hjarta um samkomulívið.

Sum skilst er hann longu farin undir at fyrireika bind 2 í røðini.

# 2300 gistingar í fjør

**Frelsunarherurin:** Ein uppgerð við hagtølum fyri virksemið hjá Herberginum í Havn vísir greitt, at tørvurin á tí ikki er vorðin minni tað farna árið.

Tilsamans vóru 2.281 gistingar í náttartilboðnum hjá Herberginum í fjør. Íalt gistu 46 fólk í Herberginum. Av hesum vóru 42 menn.

Ein uppgerð yvir virksemið vísir haraftrat, at 23 fólk gistu millum 1 og 10 ferðir, 2 gistu millum 200 og 300 ferðir, og eitt fólk gisti meiri enn 300 ferðir.

Mannfólkini hava havt 2.250 gistingar og konufólkini 31. Umframt hetta vóru 823 vitjanir í fjør.

Dagsentrið hevði í fjør 2.352 vitjanir av 60 ymiskum brúkarum. Hetta svarar til góðar sjey døgurðar í miðal um dagin, teir 11 mánaðirnar ið dagsentrið var opið.

## Samkoma fyri afrikanarar

**Lofoten:** Sunnudagin 20. mai sá ein nýggj samkoma í Noregi dagsins ljós – Lofoten Baptistmenighet. Í samkomuni finnast einans limir úr Kongo og Liberia, sum búgva í Lofoten.

Bólkurin hevur javnan havt gudstænastur saman, og meta nú at tíðin er búgvin at stovna egna samkomu. Ætlanin er at søkja um limaskap í Det Norske Baptistsamfunn á landsfundi teirra, sum verður í summar.

## Logos II til Føroya í august

**Tvøroyri:** Logos Hope verður ikki klár til august, sum upprunaliga ætlað. Ætlanin er ístaðin, at Logos II skal fara til Føroya og Íslands í august.

Tað hevur verið stóra óvissa um, nær umvælingarnar umborð á Logos Hope (fyrrverandi Norröna) vórðu lidnar.

- Nú sær út til at tað dregur enn longur út, og at skipið ikki verður siglingarklárt fyrrenn einaferð seinni í ár, verður sagt.

Skipað verður nú soleiðis fyri, at Logos II leggur leiðina um Føroya á veg til Íslands. Væntandi verður skipið á Tvøroyri í døgunum 9. til 13. august, meðan steðgurin í Íslandi eftir Føroya-vitjanina verður longri, helst fram til 28. august.

## Meiri kirkju fyri minni peningin

**Danmark:** - Fólkakirkjan er noydd at satsa uppá, at limirnir kunnu fáa meiri kirkju fyri sama pening, Ella rættari: Meiri kirkju fyri minni pening, sigur danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder.

Hetta kom fram á ársfundinum hjá landsfelagnum av meinigheitsráðum herfyri. Og hann varð stuðlaður av leiðaranum í ráðnum, Inge Lise Pedersen, sum beinleiðis spurdi, um kirkjan brúkar sína játtan rætt.

Víst varð á, at limatalið í fólkakirkjuni er minkað tey seinastu 20 árini, samstundis sum útreiðslurnar eru hækkaðar meiri enn inflasjónin.

- Tað heldur snøgt sagt ikki, um limatalið lækkar og útreiðslurnar hækka, sigur Bertel Haarder, sambært tíðindastovuna Ritzau.